# Føroyingar stýra meistaranum

**Esvagt Champion er nýggjasta farið í frálandavinnuni í Norðsjónum, og tað er næstan altíð ein føroyingur á brúnni og í maskinrúminum**

FRÁLANDAVINNA

*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Tann 29. novembur var hátíðarløta niðri á havnarlagnum í Esbjerg. Við bryggjuna lá tað nýggjasta farið í flotanum hjá frálandareiðaríinum Esvagt, og hendan dagin skuldi skipið hava navn.

Løtu seinni fekk skipið navnið „Esvagt Champion".

Frammanundan hevði reiðaríið sett tvær manningar til skipið, og sum umborð á fleiri av hinum skipunum hjá reiðarínum eru føroyingar væl umboðaðir á manningarlistunum hjá „Esvagt Champion". Á aðrari vaktini eru skiparin, yvirstýrimaðurin og maskinmeistarin føroyingar, og á hinari eru yvirstýrimaðurin og juniormeistarin føroyingar.

Tann 1. desembur fór skipið á sína fyrstu vakt við ein oljupall hjá Statoil í norskum sjógvi.



*Hesir tríggir eru umborð á „Esvagt Champion" nú um jólini. Frá vinstru: John Zachariassen, maskinmeistari úr Havn, Hans Bjarni Jacobsen, skipari úr Havn og Jóannes Hansen, yvirstýrimaður úr Sørvági*

## Átta skip

„Esvagt Champion" er 45,8 metrar langur og 11,5 metrar breiður. Skipið hevur fimm generatorsett av slagnum Cummins, og hvørt teirra er 485 KW. Skipið er smíðað í Singapore og fór haðani tann 17. oktobur.

Skipið er tað fjórða, sum Esvagt hevur fingið av skipasmiðjuni í Singapore, og reiðaríið hevur gjørt sáttmála um fýra afturat. Tvey skulu latast reiðarínum í 2008 og tey bæði seinastu í 2009.



*Jákup Klein, juniormeistari úr Miðvági og Gunnar Gardar, yvirstýrimaður úr Kollafirði eru á hinari vaktini*





*Tá „Esvagt Champion" varð navngivin. Maðurin næstuttast til vinstru á myndini er Ovin Carlsson, stjóri og reiðari. Hann er ættaður av Tvøroyri*



# Bitland víðkar enn meiri

Havn: Bitland undirskrivaði týsdagin ein leigusáttmála við felagið, sum rekur handlarnar í Handils-kjarnanum. Harvið verður nýskapanarumhvørvið hjá Bitland meira enn tvífaldað, og fer nú at telja meira enn 1.100 fermetrar í miðbýnum í Havn. Í november flutti Bitland inn í bygningin har Telebúðin heldur til. Harumframt rekur Bitland skrivstovuvirksemi í Tórsgøtu. Men áhugin fyri at verða partur av nýskapanumhvørvinum hjá Bitland er so mikið stórur, at neyðugt er at vaksa um virksemi. - Nógv verður tosað um íverksetarahús og líknandi tiltøk fyri at menna nýskapan. Bitland er ment av m.a. íverksetarum seinastu 3 árini, og í dag eru umleið 14 fyritøkur og 25 fólk knýtt at nýskap anarumhvørvinum í miðbýnum, sigur Ólavur Gregersen, stjóri í Bitland. Við nýggja leigumálinum víðka tey um skrivstovuna. Harvið nøkta tey í enn størri mun tørvin á skrivstovum til íverksetarar og smærri fyritøkur, sum ynskja at virka í einum umhvørvi, sum er merkt av menning og altjóða virksemi. Eftir ársskifti verða tillagingar gjørdar í teim ovastu hæddunum í Handilskjarnanum, og ætlanin er at byrja virksemi her 1. mars.